# Springaradráp í Klaksvík

SPRINGARAR
*Stefan í Skorini*

Leygarmorgunin klokkan 9.20 var ein flokkur av springarum á veg inn á Gøtuvág, har menn stóðu klárir at drepa.

Sýslumaðurin noktaði tó fyri, at drápið skuldi fara fram. Hann gav boð um at lata teir fara aftur.

Hetta kom væl við hjá klaksvíkingum. Tí løtu seinni, umleið klokkan 10.30, verður sami flokkur av springarum hildin til á vágni í Klaksvík.

Talan var um ein lítlan flokk av springarum, 55 í tali. Sýslumaðurin gav í hesum førinum loyvi til drápið, og tað gekk væl. Eini 50 fólk vóru við í drápinum, og býtt varð í drápspartar. Ógreitt er, hví tann eini sýslumaðurin gav forboð, og hin gav grønt ljós.

# Eldsbruni á Selatrað

ELDSBRUNI
*Stefan í Skorini*

Leygarmorgunin klokkan 11.37 varð boðað frá einum eldsbruna á Selatrað. Tað var ein smátta á skótadeplinum, sum eldur var komin í.

Konfirmantar vóru á legu og búðu í smáttuni. Við sær høvdu tey hitablásara, og tað var av hesum blásaranum, at eldur var komin í.

Sløkkiliðið var beinanvegin á staðnum og basti eldinum. Smáttan stóð tó ikki at bjarga, og dreingirnir, sum búðu har, mistu alt, teir høvdu við sær.

Løgreglan í Runavík hevur annars havt úr at gera hetta vikuskiftið. Á Strondum rendir ein bilur á tveir dreingir á súkklu, sum koyrdu útfyri bilin. Báðir fóru á sjúkrahúsið, og tann eini hevur helst brotið beinið.

Í Leirvík var fráboðan um herverk. Har hevur onkur verið í innkoyringini og sett hol á tvey hjól, áðrenn gerningsmaðurin hevur tømt eitt ruskílat omanyvir bilin. Harumframt er herverk framt kring húsini.

# Stuldur í Klaksvík



*Hesin bilurin varð meldaður stolin í Klaksvík leygarnáttina. Hann varð funnin aftur í Uppsalagøtu. Verri var við byrgingina í Haraldssundi, har ein annar stolin bilur fór á bláman*

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Fríggjanáttina varð ein annar bilur eisini meldaður stolin.Hesin persónbilurin varð tó funnin aftur í Uppsalagøtu, har hann varð farin útav vegnum.

Enn veit løgreglan ikki, hvør hevur koyrt útav, men hon hevur sín illgruna.

### 500 krónur horvnar

Í KÍ-høllini hevur onkur verið í skiftingarrúminum og tikið 500 krónur úr eini mappu. Stuldurin fór fram, meðan fólk spældi í høllini, og pengarnir lógu óvardir í skiftingarrúminum. Løgreglan hevur onga hóming av, hvør hevur verið uppá spæl.

# Ungir tjóvar koyrdu á sjógv

**Tríggir dreingir í aldrinum 15 til 16 ár sluppu ógvuliga væl frá einum ferðsluóhappi við byrgingina í Haraldssundi fríggjanáttina, tá stolni bilurin endaði á blámanum**

FERÐSLUÓHAPP
*Stefan í Skorini*

Fríggjanáttina nakað eftir midnátt fekk løgreglan fráboðan um, at ein vørubilur varð stolin í Klaksvík. Tað gekk striltið at finna bilin, tí hann varð ikki funnin fyrr enn leygardagin klokkan 17.30.

Tá lá hann á botninum í Haraldssundi. Fólk høvdu varnast, at kúfangarn av einum bili lá á vegnum, og tí varð farið at leita har. Dreingirnir høvdu koyrt norðureftir móti byrgingini, men førarin klárar ikki at sneiða til vinstru inn á sjálva byrgingina, og tí fer bilurin beina leið á sjógv.

Teir tríggir sleppa heilskapaðir úr bilinum og svimja uppá land. Síðani leggja teir leiðina aftur til Klaksvíkar, og á heimleiðini royna teir at bróta inn í ein buss, sum stóð við neystini á Strond. Tað eydnast teimum tó ikki at sleppa avstað við tí lítla bussinum.

Løgreglan hevur avhoyrt tann eina av dreingjunum, og hann hevur viðgingið brotsgerðina. Teir hava brotið lógina í fleiri førum. At koyra uttan koyrikort, stuldur av bilinum og ikki at hava boðað frá einum ferðsluóhappi.

Bilurin hevur fingið stóran skaða, tí hann hevur ligið í havinum í fleiri tímar. Bilurin hevur eisini aðrar skaðar. Ein froskmaður varð sendur niður at kann bilin, áðrenn ein kranabilur tók hann upp. Eitt líknandi mál var seinasta vikuskiftið, tá ein bilur fór á sjógv á Borðoyarvík, og eingin boðaði frá tilburðinum.

Høgni Johannesen komin aftur úr Pakistan:

# Støðan var ov hættislig

**Leygardagin valdi Høgni Johannesen, sum er trúboðari í Pakistan, at koma heimaftur til Føroya. Støðan í landinum var ov hættislig hjá honum og konuni at vera verandi. Orsøkin er hóttanin frá víðgongdum muslimum**



*Høgni Johannesen og kona hansara, Shamila, valdu at rýma úr Pakistan, nú støðan í landinum versnar*

PAKISTAN
*Stefan í Skorini*

Í seinastu viku skrivaðu vit um Høgna Johannesen, sum tá var staddur í Lahore í Pakistan í sambandi við trúboðaravirksemi. Hann greiddi tá frá, at støðan í landinum var hættislig, og at hann tá ikki visti, um hann kom heimaftur.

Leygardagin settu hann og kona hansara seg í eitt flogfar í Islamabad og hildu leiðina heimaftur.

– Vit høvdu ein fund á skúlanum, har eg undirvísi, og avgerð varð tikin um, at niðurleggja virksemið í eina tíð. Teir flestu vesturlendingarnir eru farnir heimaftur, men nakrir valdu at vera verandi. Skúlastjórin hjá mær, sum er pakistani, hevur sent familjuna til Evropa, men hann sjálvur er farin undir jørðina at goyma seg, sigur Høgni, sum nú er í Keypmannahavn.

Tað er ikki beinleiðis orsakað av hóttanini um kríggj móti Afganistan, at Høgni er rýmdur. Hann greiðir frá, at tíðindi gingu í Lahore um, at víðgongdir muslimar lótu stórar peningaupphæddir til tann, sum kom við einum hvítum vesturlendingi livandi ella deyðum.

Tað kristna umhvørvið er eisini undir støðugari hóttan, tí hugburðurin mótvegis vesturheiminum og kristindóminum er ógvuliga fíggindasinnaður. Orsøkin er tann amerikanska hernaðardubbingin í økinum.

– Vit rýmdu av skúlanum um náttina av ótta fyri álopi. Teir muslimsku prestarnir hava øst fólkið upp móti teimum kristnu og hvítum, og tí var tað vandamikið hjá okkum at vera verandi, greiðir Høgni frá.

Annars hevur Høgni blandaðar kenslur, nú hann er heimkomin. Hann hugsar nógv um vinir og kenningar í Pakistan, sum kanska eru í vanda, og familjan hjá konuni er eisini eftir. Hann er tó eisini glaður fyri at vera heima aftur.

– Vit royndu at halda út og vera verandi, men eg og konan máttu velja, og vit fóru so heim, sigur Høgni Johannesen at enda.



# Tveir strævnir dagar í Lítlu Dímum



*Elsti og yngsti maður í Lítlu Dímun hesuferð, 76 ára gamli Allon og 11 ára gamli abbasonurin, Allan. Teir eru júst komnir í land av bátinum. Seyðurin er fingin undir tak og teir hava sett seg at rinda møðina eina løtu, eftir tveir strævnar dagar*

**Í síðstu viku vóru hvalbingar í Lítlu Dímun í tveir dagar. Tað vóru tveir langir og strævnir dagar, men slaktið kundi verið betri**

SEYÐAHALD
*Áki Bertholdsen*

Hvalbingar og sandvíkingar hava altíð verið spentir uppá at fara í Lítlu Dìmun eftir slakti. Í ár var spenningurin serliga stórur og tað av tveimum orsøkum: Onnur orsøkin var, at fyri veður eydnaðist tað ongantíð í fjør at sleppa í Oynna, sum Lítla Dímun verður nevnd á mannamunni í Hvalba og í Sandvík. Hin orsøkin er, at tað nú er so nógvur vargur í Oynni, at teir hava sett sær fyri at fáa tiknan av og at fáa nýtt slag sett út.

Tí høvdu teir gjørt seg út til at liggja nátt í Oynni, tá ið teir loystu frá landi í Hvalba í dýrdarveðri tíðliga mikumorgunin.

Tilsamans vóru 34 mans uppi í oynni og tað er nakað lítið, tí tað er nógv og tungt arbeiði at gera.

Tá í teir komu aftur klokkan gott níggju hóskvøldið staðfesti formaðurin fyri Oynna heilt stutt, at tað kundi gingið betri.

– Vit róku í tveir dagar og vit høvdu góðar 430 seyðir á hondum.

Etir, at teir vóru komnir í rættina tann fyrra dagin, fóru teir aftur vestur á oyggj at taka seyð. Har gingu einir 40 seyðir eftir og tað eydnaðist at taka einar 30 av teimum í bakkanum og hann varð koyrdur beinleiðis í bátin.

Harafturat var tað mesta av gomlum seyði í rættini tikið og somuleiðis seyður við fullari ull, sum ikki hevur verið inni leingi

Menninir, sum róku, høvdu trol ímillum sín og soleiðis fingu teir tikið heilt fitt av seyði, sum legði á og annars hevði sloppið.

Mett var, at einir 130 seyðir vóru úti eftir og dagin eftir varð aftur roynt at taka teir.

– Men tað gekk sera illa. Vit vónaðu at fáa gott og væl helvtina av tí, so hóast vit royndu tvær ferðir, fingu vit ikki meiri enn einar gott 30.

– Restin læt seg snøgt sagt ikki taka. Teir fóru longur og longur niður í bakkan og einar 15-20 lupu út berginum í tann vissa deyðan, heldur enn at teir lótu segt taka.

Av tí, teir, teir høvdu tikið, vórðu seyðir 130 seyðir, sleptir útaftur, mest lomb.

### 11 til gyllinina

Tilsamans var úrslitið, at góðir 380 seyir vórðu førdir til lands.

Tað gevir 11 seyðir til hvønn gyllin og tað er tvær ferðir so nógv, sum vanligt hevur verið.

Men orsøkin til, at so nógv varð tikið, var partvís, at ikki varð rikið í fjør og partvís tað, at so nógvur vargur, sum gjørligt varð tikin hesar báðar dagarnar.

Men eftir ganga nú einir 100-130 seyðir, sum er vargur og sum ikki hevur verið á hondum.

Eliesar Poulsen sigur, at verður ein góður dagur aftur, er ætlanin at fara í Oynna einaferð at royna at taka hann.

Tá er eisini ætlanin at hava byrsu við og at skjóta sum mest av tí, sum teir ikki fáa fatur á.

Seyðurin, sum var í rættini, og sum varð sleptur útaftur, er væl og virðiliga markaður so at hann er lættur at kenna aftur.

Men ætlanin er eisini at stika betri á Oynni, fyri at raksturin næsta ár skal ganga betri.

Samstundis er avtalað, at hvør av eigarunum skal føða eitt lamb upp á hvønn hálvan gyllin at sleppa út í Oynna í vár og somuleiðis eitt næsta ár. Men teir, sum vilja kunnu lata bæði lombini í ár.

Soleiðis er ætlanin at fáa eitt sindur av slakti av Oynni aftur næsta ár, tó at tað helst verður eitt sindur minni enn í ár.

Men hesuferð var slaktið onki at reypa av. Nakað varð selt og býtt varð soleiðis, at eigararnir fingu fimm seyðir upp á hvørja hálva gyllin.

– Hjá onkrum hevur vektin ligið um 144-145 pund tilsamans, tað gevur 29 pund í miðal upp á seyðin.Tað er nakað lítið, tí av tí, at seyður varð tikin av, var nógvur vaksin seyðir uppi ímillum.

Eliesar Poulsen sigur, at nógv av lombunum vóru smá, væl undir 20 pund, men ein høvuðsorsøk til tað er, at tað varð ikki rikið í fjør.



*Eliesar Poulsen, formaður fyri Lítlu Dìmun, sigur, at raksturin kundi gingið betri og slaktið var heldur onki at reypa av. Men viðrar tað seinni, ætla teir sær í Lítlu Dímun eftir seyði einaferð afturat og tá skulu teir hava byrsu við at skjóta varg*

